# Blokkurin og yvirlæknarnir

HERI MOHR



Sum flest øllum kunnugt, gav landsstýrið ríkisstjórnini boð um, at ríkiskassablokkurin – 615.5 milliónir – oyramerktur til heilsu- og almannaverkið ikki skuldi dýrtíðarviðgerast í 5 ár frá 1. januar 2002 at rokna. Men hóast tað gongur á áttanda ári, so hevur landsstýrið ikki enn givið ríkisstjórnini boð um, at niðurbindingin ella stongsulin skal halda uppat. Hetta má sigast at vera ófatulig, fyri ikki at siga ábyrgarleys, umsiting av almennum peningi. Avleiðingar av hesum boðum frá landsstýrinum merkja vit nú øll, men mest tó gomul, sjúk, avlamin og brekað.

Í reglugerðini fyri Sjúkrahúsverk Føroya frá 14. mars 1995 við heimild í § 2, 3. stk. í lóg nr. 621 frá 22. desember 1976 er tilskilað í § 16, at yvirlæknarnir hava rætt og skyldu at leiða kanningar og viðgerðir av sjúkrahúsins sjúklingum og hava ábyrgd av hesum. Tá ið yvirlækni sendir sjúkling á sjúkrahús v.m. í Danmark, eru ávísar treytir fyri, at sjúkrahúsið (les landskassin) rindar flutning v.m.

Áðrenn sjúklingur verður sendur niður, verður hann at visitera av serlækna á viðkomandi sjúkrahúsið. Sjúklingurin verður kannaður til viðgerð á donskum sjúkrahúsi ella deild v.m., ið verður rikin ella goldin av statinum av praktiskum orsøkum helst til Rigshospitalet. Viðgerðin á niðanfyri nevndu sjúkrahúsum og deildum er eftir avtalu við ríkisstýrið kostnaðarleys fyri føroysku sjúkrahúsini: Rigshospitalet, herundir Kysthospitalet på Refsnæs, Ortopædisk Hospital i Keypmannahavn, Finsensinstitut, herunder Radiumstationen. Bert í teimum førum, har tað er heilt greitt, at sjúklingurin ikki kann viðgerast á teimum nevndu sjúkrahúsum og deildum, skal sjúklingurin kannast til onnur sjúkrahús, t.d. Andelsforeningens Gikthospital i Skelskør og Afholdsbevægelsens Behandlingsinstitutioner for alkoholskadede o.s.fr.

Sum tað framgongur av reglugerðini, so er viðgerð á donskum sjúkrahúsum kostnaðarleys fyri tey føroysku sjúkrahúsini. Flutningsgjald og uppihald á Hotel Tórshavn verður goldið av landskassanum jbr. reglugerðina frá 14. mars 1995.

Tann 1. januar 1988 fóru ríkiskassans útreiðslur fyri sjúkrarøkt av føroyingum á donskum sjúkrahúsum í blokkskipanina - og eru har framvegis. Hvørjar fíggjarligar avleiðingar omanfyri nevnda niðurbinding av blokkinum fekk fyri tann føroyska skattaborgaran og heilsu- og almannaverkið í síni heild, síggja vit frægast í landskassans almennu roknskapum í árunum 1988 – 2008, men her í hesum skrivi varpa vit ljós á fíggingina av sjúkraviðgerðum av føroyingum (í Føroyum) á donskum sjúkrahúsum í nevnda 21 ára skeiði.

Í tíðini 1. januar 1988 til 31. desember 2001 kostaði serkanning/serviðgerð á donskum sjúkrahúsum 468 milliónir. Hetta varð goldið av ríkiskassans blokki, sum tá ikki var niðurbundin.

Í tíðini 1. januar 2002 til 31. desember 2008 kostaði serkanning/serviðgerð á donskum sjúkrahúsum 526 milliónir. Av hesum vórðu 263 milliónir goldnar av ríkiskassans blokki, meðan 263 milliónir vórðu goldnar av landskassans likviditeti (gjaldføri). Í hesum tíðarskeiði hevur blokkurin verið niðurbundin, og tað er orsøkin til, at landskassin hevur veitt ríkiskassanum eina hjálpandi hond upp á 263 milliónir, sum er snøgg helvtin av útreiðslunum til viðgerðir av føroyingum í Føroyum á donskum sjúkrahúsum í hesum 7 ára skeiði.

Á heilsu- og almannaøkinum ber til at tríva í rúgvuna av dømum, har landskassin hevur goldið statskassans vegna: Í blokkinum er ríkiskassastuðul til sjúkrakassarnar. Í tíðini 2002 – 2008 hava sjúkrakassarnir fingið 217 milliónir, men av tí at blokkurin er niðurbundin, hevur landskassin goldið ríkiskassans vegna 97 milliónir av teimum 217 milliónunum.

Man hetta, at blokkurin hevur verið niðurbundin nú í 7 ár, ikki vera orsøkin til, at landskassin í stóran mun krevur lánupptøku til tað almenna húsarhaldið? Og hvussu leingi fer niðurbindingin av ríkiskassans blokkfígging at vara? Ella skal okkara vælferð gerast ein viðfáningur sammett við norðanlondum?

Tað er ikki meira enn rímiligt, at spurt verður, um nøkur lógarheimild er (1) fyri at niðurbinda blokkin, og (2) um nøkur løgtingslóg heimilar landsstýrinum at rinda eitt nú fyri serviðgerð á donskum sjúkrahúsum út yvir tað, sum er fíggjað og oyramerkt í tí í løtuni niðurbundna blokkinum?

Nú brýtur í bæði borð. Landsstýrismaðurin við heilsumálum virkar undir álvarsligum ákærutrýsti, og yvirlæknarnir á okkara sjúkrahúsum mugu spyrja, um peningur er í kassanum, áðrenn sjúklingar verða sendir til serkanning/serviðgerð á donskum sjúkrahúsum, hóast hetta ikki átti at kostað landskassanum eitt klovið oyra. Sum longu sagt, skulu flutningsútreiðslurnar og raksturin av Hotel Tórshavn gjaldast av landskassanum, og tessvegna er hetta ikki í blokkinum. Hesi døpru og órógvandi tíðindi um umstøðurnar hjá yvirlæknunum verða nú um dagarnar borin okkum í fjølmiðlunum.

Hvør kann kenna seg tryggan á báti, har manningin, við vánaligum róðrarlagi, kensluleyst tveitir árar fyri borð? - Lítlum báti rekast vit á, áraleysur at kalla.

# Óhóskilig og ískøld kringvarpsleiðslu-dispositión

JÓGVAN VIÐ KELDU:



Landið er lítið, hevur drúgvan almennan yvirbygning, ofta verður lopið um, har garðurin er lægstur, stovnar gera royndir at leggja trýst á politisku skipanina fyri at fáa hægri játtan. Oftast hevur tað eydnast, men nú er ongin peningur at játta.

**Morgunlesturin**

Eingin ivi er um, at leiðslan í Kringvarpi Føroyar hevði í hugað at provokera seg til hægri játtan, tá endursendingin av morgunlestrinum varð tikin av skránni. – Í hesum føri lat tað seg ikki gera, tí landið var á veg út í búskaparkreppu.

Um hetta er kynisma ella egoisma av leiðslu kringvarpsins, er ilt at meta um.

Men tað tykist løgið, nú bæði landsins kommunur og sjálvur landskassin leggja rygg til at brúka tíggjutals milliónir fyri at geva eldri og óhjálpnum betri umstøður, er rakstur taldur við, er talan helst um 100 tals milliónir, at almenni public service stovnur okkara ikki unnir okkara eldra og óhjálpna liði 10 minuttir frá kl. 9.50 til 10.00 fyrrapart at sleppa at hoyra morgunlesturin meiri ómakaleyst í útvarpstólinum.

Vit, sum fara til arbeiðis til vanliga tíð, hava møguleikar at hoyra morgunlesturin kl. 7.10, meðan gomul og veik helst skulu hava eitt skoðbrá fyri at koma fram, og mong kanska ikki eru framkomin. Tey hava havt hesa løtuna at gleða seg til – fyri tey – ein hátíðarløta, sum tey meiri ómakaleyst fáa ígjøgnum útvarpstólið.

**Endursendingar av endursendingum**

Kringvarpið ger nógvar góðar sendingar. Men tá ikki er nóg mikið við endursendingum, men endursendingum av endursendingum, kann verða spurt, um upplýsingar- og mentanarvirðið av fleiri av sendingunum her.

Tað kennist sum kynisma at brúka morgunlestrarnar, tey gomlu og óhjálpnu, sum gíðslar í stríðnum, tá tað fíggjarliga ikki fæst at hanga saman.

Tað kann tykjast undarligt, eftir at so mangir myndugleikar, politiskir, kirkjuligir og nógvar áhetanir hava verið, at einki batar og málið varð bara tagt burtur og nú tykist sum tað bara rekur í sandin og fer alt meiri stillisliga aftur við borðinum.

Oftast hevur eydnast almennum stovnum at trýst politiska myndugleikan til meirjáttan, tí hann er hoknaður. – Men nú er eingin peningur, so málið loysti seg politisk sjálvt, meðan gíðslar gjørdust gomul og óhjálpin. – Hetta er óhóskiligt!

Uttan sum so, at hava nakað við málið at gera, havi eg spurt meg sjálvan, um hetta er prógv um vanligt demokrati! – Ella kann demokratiið kennast so kyniskt?

Tíðargreinin

# ... Við lærumeistarum ígjøgnum ódn og yvir kyksendi

men heldur at leggja seg eftir, at dugna teimum ítøkiligu strategisku verkætlanunum.

**Strategiskar verkætlanir**

Fyri at ein verkætlan kann lýsast við heitinum "strategisk" krevst, at hon hevur nøkur eyðkenni. Hesi eyðkenni kunnu metast við støði í okkara gerandisdegi í dag og teirri framtíð, sum vit halda okkum hóma í eini veruleikakendari víðsjón.

Fyri føroyska samfelagið í dag havi eg eitt boð uppá nøkur eyðkenni við verkætlanum, sum hava strategiskan áhuga:

1. hevur eitt føroyskt initiativ
2. setir kós ímóti einum altjóða áhuga
3. setir kós ímóti at gerast fremst í heiminum innan sítt (avmarkaða) øki
4. hevur eitt týðandi mát av læruprosessum bygt inn í verkætlanina (t.e. vit gerast væl klókari, hvørt verkætlanin hepnast ella ikki)
5. hevur eitt týðandi mát av samstarvi við útlendskar partar bygt inn í verkætlanina
6. fyri vinnuligar verkætlan, at hon stevnir ímóti einum rættiliga stórum avkasti
7. fyri granskingar verkætlan, at hon gevur eitt íkast í sambandinum við EU gransking (ella annað millumtjóða granskingarumhvørvi)
8. fyri verkætlan á markamótinum millum gransking og vinnu, at hon umfram eyðkennið omanfyri eisini at vit helst eru "lead partner", stigtakari ella á annan hátt partur av "veruligu leiðsluni", umframt at Føroyar gevur eitt serstakt íkast í verkætlanina

Støðan í Føroyum í dag er tann, at rættiliga nógvar verkætlanir, sum heilt ella partvíst hava omanfyri nevndu eyðkenni, eru í gerð. Hetta eru flestallar verkætlanir, sum í tí smáa hava verið í gerð í 3-10 ár fyri at røkka slíkum eyðkennum.

Allar hesar verkætlanir hava eitt umhvørvi, sum er í strategiskum kyksendi. Størsta avbjóðingin fyri hvørja einstaka verkætlan er tí, at ítøkiligu áhugamálini, sum skulu vera viðvirkandi til at røkka setninginum, eru trupul at fáa í talu.

Almennir og hálvalmennir stovnar, fíggjarstovnar og onnur skulu geva síni viðmæli, seta partapening í, veita tænastur, keypa, geva loyvi o.s.fr. Hvør einstakur stovnur hevur avmarkaðar ítøkiligar møguleikar (les vitan og førleika annars) at dugna verkætlanini. Tað kann tí vera møtimikið og krevja mót og manshjartað hjá tí starvsfólki ella leiðara, sum skal viðmæla ætlanini. Samstundis er tað í Føroyum í dag púra ómakaleyst og vandaleyst at mæla frá, ikki at geva loyvi ella enntá beinleiðis at leggja fótonglar út.

Umframt hesar avbjóðingarnar, skal hvør einstøk verkætlan við nevndu eyðkennum eisini átaka sær sín ríkiliga part av slatri, sleygi og bakbiti, sum hava so góð gróðrarlíkindi í strategiskum kyksendi.

**Samanumtak**

Politiska skipanin hevur eina stóra avbjóðing fyri framman. Eg vil mæla okkum, sum standa á síðulinjuni og geva okkara íkast, til at vanda okkum um orðini, og at vit ikki leggja ov stóran dent á ta ítøkiligu javnvág, sum einans tann politiska skipanin kann finna í praksis.

Høvuðsavbjóðingin er at finna loysnir, sum byrgja fyri avleiðingunum frá eini fíggjarligari flóðaldu, og sum samstundis eru við til at leggja lunnar undir eitt nýtt strategiskt fótafesti, har fiskivinnan ikki hevur høvuðsleiklutin í menningarmøguleikunum.

Keynes er helst millum stóru lærumeistararnar í búskaparfrøðini og kanska ein av teim frægu at lurta eftir í sambandi við fíggjarligu avbjóðingarnar. Minzberg og Johnsen eru millum stóru lærumeistararnar í strategiskari leiðslu, og eg vil mæla til at lurta væl eftir teimum í sambandi við strategisku avbjóðingarnar.

Dentur eigur at verða lagdur á tríggjar høvuðsstættir:

a. Búskaparstýring fyri at halda hjólunum malandi
b. At fáa tamarhald á almennu funktiónunum
c. At vera viðvirkandi til at byggja upp strategiskar læruprosessir ígjøgnum tær ítøkiligu verkætlanir, sum longu eru settar í verk og tær, sum møguliga verða settar í verk í næstum